## Sun vrakar Brown

Tað størsta dagblaðið í Bretlandi, Sun, kunngjørdi í gjár, at tað fer at styðja tann konservativa andstøðuflokkin upp undir parlamentsvalið næsta ár. Talan er um eina kúvending, tí tey seinastu tólv árini hevur blaðið styðjað arbeiðaraflokkin Labour. Sjónvarpsstøðin Sky heldur, at avgerðin hjá leiðsluni á Sun er tann avgerandi naglin í ta politisku kistuna hjá Gordon Brown, forsætisráðharra. Blaðstjórnin sigur, at hon tók avgerð aftan á røðuna, sum Brown helt á ársfundinum hjá Labour fyrradagin, tí hon var ikki nóg sannførandi.



# Frírúmið hjá Fróða

**Í øllum meldrinum av IOC-toppfundi í Keypmannahavn, helt Fróði Hansen útgávukonsert mitt inni í danska høvuðsstaðnum**

TÓNLEIKUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*




*Fróði Hansen var ógvuliga væl stuðlaður av sínum bólki. Sjálvur spældi hann gittar og sang, umframt at munnharpan eisini var frammi viðhvørt*

*Mynd: Rólant Waag Dam*

Keypmannahavn pumpar í hesum døgum. Býurin er púrasta uppi at koyra. Sjónvarpsrásirnar, útvarpsstøðirnar, dagbløðini og internetssíðurnar koyra øll við breaking news! Sjálv amerikanska forsetafrúan, Michelle Obama, er lend í Kastrup og skal vitja danska høvuðsstaðin næstu dagarnar.

Við henni fylgja fleiri amerikonsk elituítróttarfólk, borgarstjórin í Chicago og talkshow-verturin Oprah Winfrey.

Akkurát tí, at Keypmannahavn og fólk flest í býnum standa á høvdinum um dagarnar, kendist tað sum ein lætti at koma inn í ráa og ópoleraða kjallaran í Kattesundet. Ein síðugøta til Strøget, har áðurnevnda Oprah í gjár hevði gingið oman og niðan nakrar tímar frammanundan konsertina, meðan eitt øgiligt fjølmiðlalið og forvitnir danir runnu aftaná.

Inni í Lades Kælder nakrar tímar seinni var ferðin ein onnur. Kjallarin kendist næstan sum eitt slag av frírúmi, har øll kundu anda út, njóta eina øl og hvønn annan.

– Eg skal heldur ikki útiloka, at eg havi mist onkrar áhoyrarar til hesar stjørnur, segði Fróði Hansen smílandi eftir konsertina í gjárkvøldið.

### Fróði og feiti bólkurin

Fróði Hansen hevði eisini grund til at smílast. Hann hevði júst sungið, spælt gittar og munnharmoniku og verið serstakliga væl stuðlaður av frálíka bólkinum, sum taldi fýra mans. Sveinur Dam á el-gittar, Rúni Mortensen á trummur og donsku Anders Hellborn og Johannes Buhl Andresen á ávíkavist bass og keyboard. Serliga síðstnevndi var serstakliga dugnaligur og ein frægd at hoyra og eygleiða.

Somuleiðis var tað feitt, tá Fróði Hansen hevði so dugnaligt fólk aftrat sær, at hesir so eisini sluppu at folda seg út. Við nógvum og drúgvum solo’um sluppu hesir at markera seg og spæla sær, meðan Fróði Hansen trein av pallinum og stillaði millum áhoyrararnar. Feitt!

– Tað gekk yvirraskandi væl og betri enn, tá vit hava vant í síðstuni. Hetta var eisini okkara fyrsta veruliga konsert síðani fløgan kom út, og tí var tað feitt at so nógv fólk komu, segði Fróði Hansen, sum eftir fløguútgávuna í summar spældi nøkur fá løg í Tutl í Tórsgøtu í Havn.

### Munur á konsert og útgávukonsert

Fróði Hansen og restin av manningini sá eisini út til at hugna sær á pallinum. Tað sama gjørdu áhoyrararnir. Kortini var saknur í eitt sindur av frágreiðing frá Fróða. Talan var um eina útgávukonsert, og tá tað er tilfeldið, hevði tað verið passaligt við nøkrum orðum um fløguna, tekstirnar og løgini. Tað er munur á eini konsert og eini útgávukonsert, men hetta sást ikki aftur í gjár. Ikki tí, konsertin var góð og tað ætlar Fróði Hansen at byggja víðari á.

### Næsta útgávan er klár

Næsta konsertin verður á The Rock og seinni skal hann eisini inn í Studenterhuset at spæla. Fróði Hansen sigur, at teir ætla at spæla so nógv sum gjørligt nú útgávan er fesk.

– Men neyvan verður leingi til næstu útgávuna. Henda fløgan varð innspæld fyri akkurát einum ári síðani, men eg havi longu tilfarið til næstu fløguna klárt. Tað er bara ein spurningur um figging, so kemur hon eisini út, sigur Fróði Hansen.



*Nógv fólk høvdu leitað sær í Lades Kælder mikukvøldið meðan konsertin var*

*Mynd: Rólant Waag Dam*